# Kaotiskir tilstandir í Frítíðarskúlanum í Hoyvík

**Vandamiklar trappur. Eingin køkur. Fáar leikur. Einki hegn, ið forðar fyri, at børnini renna oman á vegin. Og eitt tún, ið minnir um eitt byggipláss. Trygdin í nýggja Frítíðarskúlanum í Hoyvík er út av lagi. Foreldrini óttast, og starvsfólkini kunnu ikki annað enn vátta, at støðan á stovninum er kaotisk. Arbeiðseftirlitið fær lítið gjørt**



SKÚLABYGGING
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

- Alt er kaotiskt í løtuni. Vit hava ongan køk, onga telefon og trygdin er ikki í lagi.

Tað váttar eitt av starvsfólkunum í Frítíðarskúlanum í Hoyvík, sum lat upp mánadagin. Hann átti kanska als ikki at vera latin upp í verandi líki. Tí arbeiðið er ikki liðugt enn. Umframt vantandi køkin og telefonina, eru alt ov fáar leikur til tey umleið 110 børnini. Trygdin er heldur ikki í lagi. Hegnið, sum skal tryggja, at børnini ikki renna oman á vegin, er ikki gjørt enn. Túnið líkist mestsum einum byggiplássi. Og inni ganga børnini á vandamiklum trappum, har rimaverkið øðrumegin vantar.

- Vit mugu alla tíðina ansa eftir, at børnini ikki detta í trappunum. Hetta er als ikki nøktandi, sigur starvsfólkið, sum ikki skilur, at Býráðið hevur latið frítíðarskúlan upp í verandi líki.

### Foreldrini stúra

Skúlin skuldi eftir ætlan vera klárur at vera tikin í nýtslu á nýggjárinum, men arbeiðið bleiv nógv seinkað. Býráðið lovaði, at alt skuldi vera liðugt, tá skúlin byrjaði aftur eftir summarfrítíðina, men so varð ikki.

Sum skilst hevur leiðarin í skúlanum dagliga vitjað umsitingina hjá Tórshavnar Býráði fyri at kæra sína neyð, men lítið hjálpir.

- Ein arbeiðsmaður var her í gjár. Hann lovaði, at okkurt skuldi henda beinanvegin, men er einki gjørt, sigur starvsfólkið.

Sum skilst er fleiri foreldur ónøgd við umstøðurnar á Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

- Eg tori illa at lata barnið vera har, men av tí at eg arbeiði, er einki val. Seinastu dagarnar havi eg avheinta barnið longu á døgurða. Tað fer ikki at bera til, tá summarfrítíðin er liðug, sigur ein stúrin pápi við Sosialin.

### Arbeiðseftirlitið onga ábyrgd

Sum skilst er tað Býráðið sjálvt, ið avger, nær ein frítíðarskúli er klárur at taka í nýtslu. Umstøðurnar hjá starvsfólkið hoyra Arbeiðseftirlitinum til. Men ikki umstøðurnar hjá børnunum. Tey eru jú ikki til arbeiðis.

- Barnatrygd er ikki okkara borð. Hinvegin, um talan er um vandamiklar trappur, so áttu vit at tala at. Starvsfólk kunnu jú eisini detta, sigur Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum.

Arbeiðseftirlitið skal ummæla øll byggimál, áðrenn tey verða tikin í nýtslu. Hetta merkir ikki, at eitt arbeiðspláss skal verða góðkent, áðrenn tað alment verður í nýtslu.

- Vit skriva ummæli, og um nakað er at finnast at, skal arbeiðsplássið syrgja fyri, at hetta verður bøtt. Tað merkir ikki, at arbeiðið verður niðurlagt, sigur stjórin á Arbeiðseftirlitinum.

### Óheppin handfaring

Tað er annars ikki meir enn ein mánaður síðani, at eitt annað foreldur vendi sær til Sosialin og kærdi sína neyð um frítíðarskúlan. Tað málið snúði seg um sjálva handfaringina av dagstovnaflytingini. Frítíðarskúlin í Hoyvík helt nevniliga til í øðrum hølum í Stoffalág. Ein munnlig avtala um at starvsfólkini har skuldi fylgja við børnunum niðan í skúlan í Hoyvik varð brotin, og hetta fekk eitt foreldur at tala at. Fleiri av børnunum í skúlanum hava serligan tørv, og tey hava ikki gott av ov ógvusligum broytingum, so sum starvsfólkaskifti, vildi pápin vera við.



*Frítíðarskúlin í Hoyvík er ikki liðugur. Túnið líkist einum byggiplássi og umhvørvið er ikki barnavinarligt. Kortini er hann tikin í nýtslu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nýggi Cheops-eigarin:

# Miðbýurin er steindeyður

**- Miðbýurin í dag er steindeyður. Okkurt má gerast nú, um hann ikki skal hvørva fullkomiliga, heldur kokkurin Uni Gullfoss, sum hevur yvirtikið leigusáttmálan um at reka Café Cheops í Havn**

EIGARASKIFTI
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Tá Gamla Konditaríið skifti eigara og varð umvælt fyri nøkrum árum síðani, hvarv ein býarmynd í Havn. Stamgestirnir, ið dagliga tóku sín kaffimunn í kaffistaðnum, rýmdu oman í gamla Sjómansheimið. Men stendur tað til Una Gullfoss, ið júst hevur yvirtikið leigusáttmálan um at reka staðið, skulu gomlu stamgestirnir nú niðan aftur í Gamla Konditaríið, ið nú eitur Café Cheops.

- Staðið var ein býarmynd í Havnini. Eg ætli at endurskapa hesa býarmynd. Tað skal peppast eitt sindur upp, men gamli andin skal innaftur, sigur 30 ára gamli kokkurin, sum hevur yvirtikið Café Cheops.

### Ov dýrt aðrastaðni

Kaffistovan, ið hevur hálvt skeinkiloyvi, hevur skift hendur nakrar ferðir seinastu árini. Fleiri leigarar hava verið, og tað tykist, sum torført hevur verið at fáa alt at mala runt. Men sambært Una Gullfoss er pláss fyri Cheops millum hini í skeinkistøðini í miðbýnum, har kappingin er hørð.

- Havnin vantar eitt bíligt og gott matstað fyrrapart og um dagin. Tað, ið støðini í Havn bjóða í dag, er alt ov dýrt. Og tað er har, eg síggi ein góðan møguleika at gera okkurt skilagott. Ein léttan frokost, sum ikki skal kosta alla verðina, heldur 30 ára gamli kokkurin fyri.

Hann leggur afturat, at fólk er vælkomin at koma við uppskotum um navnabroyting.

- Eg haldi ikki, at núverandi navn er nóg gott. Tað riggar ikki til virksemið, sigur Uni Gullfoss.

### Málast av nýggjum

Enn er ov tíðliga at tosa um ítøkiligar broytingar á skeinkistaðnum. Men Uni Gullfoss hevur gjørt sær nakrar tankar. Alt skal málast av nýggjum. Blái neonliturin verður skiftur út við ljósari litum. Matskráin verður broytt. Og náttarmatsølan í vikuskiftunum skal møguliga gerast meiri lokkandi.

Uni Gullfoss, sum varð útlærdur kokkur í 1999, hevur drúgvar royndir innan økið. Hann hevur verið køksstjóri á bæði Hotel Føroyum og Hafnia. Hann hevur egna catering-fyritøku, sum ger mat, og hevur í seinastuni staðið fyri matgerðini í Café Natúr og Rex.



*- Gamla Konditaríið var ein býarmynd í Havnini. Eg ætli at endurskapa hesa býarmynd, sigur Uni Gullfoss, ið hevur yvirtikið leigusáttmálan fyri Café Cheops*

*Mynd: Álvur Haraldsen*